DAGBÓK

Leygardagin 1. apríl.
Seinna kvarter.
2. apríl: 1. sunnudagur eftir páskir.
5. apríl: sól risur kl. 5,41 og setur kl. 19.21.
Vit eru í 26. viku á vetri.

— — — — — — —

Uttanlanda:
150 ár síðan listamálarin P. C. Skovgaard varð føddur. — Skovgård var væl kendur dansk ur listarmálari og er serliga kendur fyri sínar landslagsmálningar. Hann doyði í 1875.

— — — — — — —

APRÍL:
Navnið apríl kemur av latinska orðinum »aperire«, sum merkir at lata upp, og her er tað várið, ið tað verður upplatið fyri.

HON skrivar

Tað eru kvinnur aftanfyri alt:

MADAME NGO DINH NHU

Madame Ngo Dinh Nhu (42 ár) er ivaleyst tann kvinnan í Asiu — undantikin tó madame Chiang — sum er mest umrødd í bløðunum.

Henda vakra vietnamesarinnan varð ofta avmyndað í sambandi við svágin Ngo Dinh Diem. Tað var eisini hon, sum kom at standa fyri skotum, sum hin kyniska og arroganta kvinnan, tá familjan brast saman við buddhistarnar í 1963.



Hon talaði um »munkanna grill-show« (sjálvbrenning) og var soleiðis við til at skapa tann illvilja, sum endaði við, at herleiðarnir tóku valdið í landinum. Teir beindu fyri manni hennara og svágrinum.

Madame Nhu fekk stóran part av skuldini fyri harðræðið hjá Diem-stýrinum, men almikið talar fyri, at hon var ótrúðliga óvitandi um, hvat maðurin og onnur í familjuni gjordu.

Hon slapp undan vreiði vietnamesiska fólksins í 1963, tí hon var stødd uttanlanda, har hon síðani hevur barst dúgliga fyri at prógva, at USA stóð aftanfyri hernaðarliga kvettið í 1963. Í løtuni býr hon í Paris.

Góð ráð

UM AT NEGLA



Tað kann ofta koma sera illa við at fáa stórar rivur í, tá ið ein seym ur skal slástast í. Er vandi fyri at trøið rivnar, tá neglt verður, eru tað góð ráð at smyrja sápu uppá endan á seyminum.

VÆL SAGT

So leingi vit goyma eitt loyndarmál, er tað fangi okkara. Sleppa vit ti leysum, eru vit fangi tess
(H. C. Andersen)


— — — — — — —

Virði mansins kann metast eftir talinum av vinum hansara og dygd teirra!

— — — — — — —


Vinskapur er altíð gagnligur, kærleikin skaðar av og á!

TRÍKANTURIN:



1 = hjáljóð
2 = djóramál
3 = goym
4 = fuglabú staður
5 = vermir

WEEK-END




Føroyar og útheimurin

Tað er sjálvandi umráðandi at vera við í øllum lutum, tá ið talan er um okkara viðurskifti við útheimin. Heilt at átaka okkum alla uttanríkistænastuna er ógvuliga kostnaðarmikið, og tað man vera ivasamt um vit eiga manningina til ein slíkan kravmiklan stovn.

Vit hava í løtuni tann fyrimun at hava uttanríkistænastuna felags við Danmark, sum gjøgnum mong ár hevur alt upp ta røttu manningina, ið nútíðardiplomatiið krevur, og tað er eingin ivi um, at danir vilja varveita okkara áhugamál á besta hátt.

Vit hava tó slíkar serinteressur mótvegis útheiminum, at tað er ráðiligt, at vit sjálvir eru við, og hetta letur seg væl gera, tí sambært heimastýrislógina kunnu vit bæði seta menn í danska uttanríkisráðið og við tær donsku sendistovurnar í øðrum londum. Vit sleppa tá undan tí stóru manningini, og vit hava rætta diplomatiska snildið okkum til hjálpar.

KLÁRAR TÚ HESA?




Tá ið tú hevur funnið orð fyri hvørja einstaka mynd, tekur fyrsta bókstav úr hesum orðum og setur teir rætt saman, fært tú navnið á einum føroyskum fiskifari!

SMÁSKEMT



- Vilt tú hoyra síðstu yrking mína?
— Ja, bara eg kann lita á, at tað er hin síðsta.

KLOKKUGÁTAN:



1 — 4 = brattlendi
4 — 6 = soltin
6 — 10 = berg
11 — 12 = klokka
1 — 12 = gamal trolari

5 spurningar

1. Hvar er Brune banke?
2. Hvør var Cincinatus?
3. Hvussu nógvir lógmenn hava verið síðan 1948?
4. Hvør er norskur uttanríkisráðharri?
5. Hvat merkir BRT?

— — — — — —

SVAR: 1) Í Norðsjónum 2) rómverskur diktator 3) 4 4) John Lyng 5) brutto registret ton.

Rímsmiðjan

DÓPSSTRÍÐ

Í bløðunum hava prædikumenn av ymiskum slag tikið harðliga til orða um dóp — annaðhvørt doypast skulu småbørn ella vaksin.

Jóhan Weihe, sálarhirði í Dimmu sigur avgjørt greitt, at í sær av bapitismu ei er so frægt sum grannið eitt. Deilast teir í bløðunum, um best er lítla barnið doypa, ella bíða hagar til tað sjálvt í karið dugir loypa. Men sambært Dimmu er bert talan um meira ella minni natni, tað vil siga, hvør ið brúkar minni ella meir av vatni!

Veitst tú

AT av øllum teimum amerikansku forsetunum hava bara ein — **James Buchman — verið gamal drongur. Ein annar — Grover Cleveland var gamal drongur, tá ið hann tók við forsetastarvinum, men hann gifti seg meðan hann var forseti.**

AT í USA rokna teir við, at har eru umleið 2 miljónir fólk, sum stama meir og minni, og at teir kunu meina, at øll hesi kunnu sleppa av við stamingina, bara tey sjálvi eru til reið ar at leggja seg undir hina røttu viðgerðina.

AT ein ikki kann siga tað vera stórvegis vandamikið at leypa út úr flogfari við fallskyggja, tí royndirnar vísa, at bara ein av hvørjum 1000 kemur til skaða, og aloftast er hetta bara smásmuddir.

AT heilt frá steinøldini av hevur handaheilsanin verið vanligur siður hjá fólki. Upprunaliga tóku teir í hondina á hvørjum øðrum fyri at vísa, at teir ikki vóru vápnaðir og ikki ætlaðu at elva til stríð.

hugskot

EITT SERA SJÁLDSAMT TESTAMENTI

Amerikanski landarbeiðarin James Kidd testamenteraði 200.000 dollars eftir seg. Hann forsvann í 1949. Í 1950 søgdu myndugleikarnir frá, at hann var deyður. Eftir hann lá testamenti, sum hann hevði skrivað longu í 1946. Sjálvur sigur hann seg ongatíð at hava verið giftur; men tvær systrar í Arizona gera krav uppá peningin. Tær siga hann vera faðir teirra, men at hann skildist frá mammuni í 1913.



Testamentið ljóðar stutt og greitt: **»Seljið alt eg eigi, tá eg eri deyður. Gevið prestinum 100 dollars fyri at halda eina vakra talu á grovini, og gevið avlopið av pengunum til ein stovn, ið vil átaka sær at fáa greiðu á, at tað er ein sál, sum rýmir úr menniskjum, tá tey eru deyð«.**

Sakførarar hava tjakast um, hvat skal gerast við pengarnar; men nú eru teir samdir um at lata rættin taka sær av málinum, ikki minst av tí at ikki færri enn 17 ymisk trúðarfeløg gera krav uppá peningin.



— Frálhaldsol, ja, tað er nakað ein skal halda sær frá!

* * *

— Tað er skammiligt, sum tygum bera tygum at, segði fangafongtarin við ein fanga.

— Ja, ja, eru tygum misnøgdur við meg, kunnu tygum bara koyra meg út, svaraði fangin.

* * *

Frá figgindunum kann ein vænta alt. Frá vinunum kemur tað meira óvæntað!

* * *

Anna: Vit fara uttanlands at halda feriu triðja hvørt ár.
Hanna: Hvat gera tit hini árini?
Anna: Fyrsta árið tosa vit um feriuna í fjor og næsta árið tosa vit um næstu feriu.

* * *

Drekk eina skál fyri konuni, so hevur tú altíð ein umskyldning!

SJÓVINNA

Saltfiskaframleiðslan

Veiðan við Grønland og New Foundland var í fjor samanlagt 95 pst. av allari føroyskari saltfiskaframleiðslu, so væl skilst, hvønn týdning hesi veiðuøki hava.


Í fjor var veiðan á nevndu veiðuøkjum 89 pst. av allari føroyskari saltfiskaframleiðslu, meðan hon á somu leiðum var bara 37 pst. í 1956, tó at samlaða saltfiskaframleiðslan hetta árið var munandi størri enn í fjor: **33.816** tons í 1956 og **28.692** tons í 1966.



Tað er Grønland, ið hevur tey størstu tølini at vísa á í hesum sambandi — so nógv tey størstu, sum tað framgongur av yvirlitinum

Saltfiskaframleiðslan lutað eftir veiðuøkjum:

Grønland		**23.426 tons**
New Foundland		**3.700 tons**
Ísland		**939 tons**
Føroyar		**627 tons**



Yvir: 1) kløkkur 6) hjún 7) segl 9) felag 10) forfylg 12) pen 14) kúgan 16) grikskur bókstavur 17) í andlitinum 19) harmar.

Niður: 1) næla 2) tíðindastova 3) fryst 4) kroppur 5) á rokki 8) reim 11) smíðareiðskapur 13) stykkjamál 15) iløt 18) skipastavir.

Norðoya Sparikassi

tlf. 5043 **stovnaður 1919** **tlf. 5043**

Renta av innistandandi peningi:

3 mánaða uppsøgn	5 % p. a.
vanlig konti	4 % p. a.
kekk konti	2 % p. a.

Fyri peningahæddir við longri uppsagnartíð verður renta latin eftir seravtalu.

Avgreiðslutíðin er:
vanligar gerandisdagar kl. 10—12 og kl. 13½—15½
leygardag kl. 10 —12½

Deild: Leirvíkar Sparikassi
avgreiðslutíð: týsdag og friggjadag kl. 15½—17.